# Malmros hevur hálað 700 fólk




*Birgir Enni, Niels Malmros og Jens Astrup umborð á Norðlýsinum.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

**Barbara er sýnd fyri síðstu ferð, men Niels Malmros kann ikki sleppa Føroyum. Eitt næstan óveruligt forvitni er á honum, tá tað umræður Føroyar**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Vit hava øll lisið greinina áður. Ein dani ella annar útlendingur, sum elskar at vera í Føroyum og rósar hesum vøkru oyggjum upp um skýggja. Ì Føroyum er so deiligt, so vakurt og fólk eru so óalmindiliga fitt. Jú, soleiðis er hesin eisini. Deiligt, deiligt, deiligt.

Men tað er nakað meira við Niels Malmros. Tú bæði kennir tað, tá hann tosar, og hoyrir tað á honum; hvussu ótrúliga nógv Føroyar hava at siga fyri hann. Hesin brennandi áhugin fyri øllum føroyskum. Hendan gleðin við at sýna Føroyar fram. Hetta er eingin vanligur ferðamaður, sum situr yvir av okkum í føroyskari ull. Allur hansara kroppur verður nýttur til at greiða frá og øll hansara positiva útstráling sveimar í luftini, tá hann greiðir frá um túrarnar og upplivingarnar í Føroyum. Tað er eingin ivi, at hetta kemur langt innanúr. Eitt heilt óveruligt forvitni er á honum. Ein hugur at lata Føroyar upp fyri fólki, ið tú ikki finnur betri hjá nøkrum øðrum.

### Á ferð

Ókey. Hann er kanska heldur ikki heimsins størsta nýggjheit. Hann er jú øgiliga ofta í Føroyum. Faktiskt hvørt einasta ár. Og aftur næsta ár. Men hann kemur ongantíð einsamallur til Føroya. Í alt hevur hann havt sjeyhundrað fólk við sær til Føroya, síðani filmurin um Barbaru varð frumsýndur í 1997.

- Vit fóru tann fyrsta túrin í 1998, og síðani hevur tað bara vundið upp á seg. Tað er bæði við danska læknafelagnum, við vinfólki og við øðrum, sigur Niels Malmros.

Vit hava fangað hann og ferðalagið umborð á Norðlýsinum síðsta dagin á vitjanini hesuferð. Danski filmsleikstjórin eigur nógvar vinir og nógva virðing í Føroyum fyri filmin um Barbaru. Miðskeiðis í nítiárunum var í hann heilum Føroyum í sambandi við fyrireikingar og upptøkurnar av filminum um Barbaru.

Ferðirnar seinnu árini eru sum oftast fimm dagar. Tey hyggja eitt sindur skeivt at hvørjum øðrum, tá spurt verður um, hví vitjanin í Føroyum júst skal skal vera í fimm dagar. Soleiðis hevur tað bara lagað seg.

Fyrstu túrarnir vórðu fyriskipaðir í samstarvi við Berlingske Tidende, har Niels Malmros var ferðaleiðari. Men nú er hann ikki so nógv fyri at verða kallaður fyri ferðaleiðari.

- Eg eri bara tann ferðandi, sum sigur hinum, hvar vit fara og hvat vit skulu gera, sigur Niels Malmros og fólkini rundanum flenna í kíki..

Tað eru tó nakrir rættiliga hendingaríkir dagar, ið ferðaløgini gera sær í Føroyum. Mykines er eitt "must", sum tey siga. Men tað heitasta nýggjasta eru níggju tímar langir gongutúrar í Eysturoynni.

- Tað eydnast eisini hvørja ferð við væl við veðrinum. Tað er sama vika á hvørjum ári, og tað vísir seg at vera mjørki í Havn og sól í Saksun, sigur Niels Malmros.

Vit skulu ikki fara so langt sum at siga, at hann vísir Føroyar fram sum sítt egna land, men Føroyar hava nakað heilt serligt at siga fyri danska filmsleikstjóran. Hann kann ikki fáa nóg mikið av Føroyum.

### Nýggjan film

Men hóast nógvir føroyingar høvdu ynskt sær aftur at kunna uppliva ein film um